# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# 19 spælarar fingu reyða kortið

**Jose Manuel Barro Escandon hevur sett fleirfalt heimsmet við at vísa 19 spælarar út í einum fótbóltsdysti**

FÓTBÓLTUR
*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*

Ein spanskur fótbóltsdómari er við at gerast heimskendur. Ikki tí hann dømir í Primera Liga ella Segunda Liga - bestu og næstbestu deildini í Spania - men tí hann megnaði at vísa 19 spælarar út í einum fótbóltsdysti. Talan var um ein dyst í einari lokalari amatørdeild millum liðini Recreativo Linense og Saladillo de Algeciras.

Tá 54 minuttir vóru farnir vísti Escandon einum spælara út, og tá byrjaði alt rokið. Spælarar og áskoðarar lupu á dómaran, sum helt áfram við at vísa tað reyða kortið. Tá friður loksins valdaði kundi Jose Manuel Barro Escandon gera status, og hann taldi seg fram til, at hann hevði víst 19 av teimum 22 spælarunum av vøllinum. 9 frá Saladillo, og 10 frá Recreativo.

Dómarin skundaði sær at blása dystin av, og rann inn í skiftingarrúmið fyri at goyma seg fyri teimum illu spælarunum.




*Ikki færri enn 19 ferðir hevði Jose Manuel Barro Escandon reyða kortið á loftið, áðrenn hann flýggjaði undan uppøstu spælarunum*

# Kastikapping í tveimum støðum

Sunnudagin skipaði Hvirlan í Havn fyri kastikapping, har kappast varð í teimum fýra olympisku kastigreinunum.

Kappingin var tann fyrsta á árinum, men kappingin var eisini sermerkt á tann hátt, at kappast varð í teimum støðum.

Frælsur ítróttur í høvuðsstaðnum hevur annars fegnast um nýggju Tórsbreyt, men í illveðrinum fyri jól fór kastibreytin her av vindi, og tí varð eisini neyðugt at nýta gamla kastivøllin við Eysturskúlan til kappingina. Ein støða, sum ikki er meira enn næstbest.

Størsta hálið gjørdi Rógvi Højgaard í spjótkasti, tá hann kastaði longsta kastið, sum er kastað í Føroyum. Og sum samstundis eisini rakk Oyggjaleikakravinum, sum sett er.

Hjá kvinnum var tað ikki minst Randi Kúrberg, sum gjørdi um seg.

Hjá teimum yngru kastarunum vísti Helgi Geyti enn einaferð, at hann heilt skjótt veruliga kann bjóða teimum vaksnu.

Úrslitini frá kappingini síggjast aðrastaðni á síðuni.

**-mørk**

**Kastikapping, úrslit**

**Hamarkast**

| Bólkur | Reiðskapur | Íðkari | Felag | Úrslit |
|---|---|---|---|---|
| Kvinnur | 4,00 Kg | Randi Kúrberg | Hvirlan | 35,21 m |
| Menn | 7,26 Kg | Uni Højgaard | Hvirlan | 24,69 m |
| - | 7,26 Kg | Hjalti Lamhauge | Hvirlan | 15,49 m |

**Diskuskast**

| Bólkur | Reiðskapur | Íðkari | Felag | Úrslit |
|---|---|---|---|---|
| Kvinnur | 1,00 Kg | Meifríð Hansen | Hvirlan | 25,80 m |
| Menn | 2,00 Kg | Hjalti Lamhauge | Hvirlan | 21,01 m |

**Spjótkast**

| Bólkur | Reiðskapur | Íðkari | Felag | Úrslit |
|---|---|---|---|---|
| Kvinnur | 600 g | Randi Kúrberg | Hvirlan | 29,00 m |
| - | 600 g | Meifríð Hansen | Hvirlan | 24,03 m |
| Menn | 800 g | Rógvi Højgaard | Hvirlan | 56,30 m |
| - | 800 g | Uni Højgaard | Hvirlan | 31,51 m |
| - | 800 g | Hjalti Lamhauge | Hvirlan | 24,96 m |
| D16 | 700 g | Helgi Geyti | Hvirlan | 32,34 m |
| D15 | 600 g | Steinolvur Geyti | Hvirlan | 27,60 m |

**Kúlustoyt**

| Bólkur | Reiðskapur | Íðkari | Felag | Úrslit |
|---|---|---|---|---|
| Kvinnur | 4,00 Kg | Randi Kúrberg | Hvirlan | 7,53 m |
| Menn | 7,26 Kg | Uni Højgaard | Hvirlan | 8,44 m |
| - | 7,26 Kg | Rógvi Højgaard | Hvirlan | 8,41 m |
| - | 7,26 Kg | Hjalti Lamhauge | Hvirlan | 7,24 m |
| D16 | 5,00 Kg | Helgi Geyti | Hvirlan | 7,81 m |

## Fleyr er ikki í steypafinaluni

Í blaðnum í gjár skrivaðu vit, at kvinnurnar hjá Fleyr við sigrinum í Mjølnir-kappingini vunnu sær rættin til at spæla í steypafinaluni um góðan mánað. Hetta var tó ikki rætt. Dráttur, sum Fleyr basti í finaluni sunnudagin, vann nevnliga Fleyrkappingina, og tí stendur nú á jøvnum millum tey bæði liðini í kappingini um at vinna sær pláss í steypafinaluni. Tí verður neyðugt við einum triðja dysti millum tey bæði liðini, áðrenn mótstøðuliðið hjá SÍ í steypafinaluni er funnið.

**-mørk**

## Hendrik Rubeksen til 07 Vestur

Hendrik Rubeksen, sum er uppaldur í HB, men sum eisini hevur roynt seg í øðrum feløgum, skal styrkja um álopið hjá felagsliðnum.

Hettá váttar formaðurin í 07 Vestur, Eivin Jacobsen, fyri Vágaportalinum.

Hendrik Rubeksen er uppaldur í HB, har hann eisini spældi í fjør. Hann hevur tó eisini roynt seg hjá B68 og GÍ.

**-mørk**

## Blackburn í trupulleikum

Blackburn hevur vunnið seg víðari til 4. umfar í FA Cup kappingini. Lítið annað kunnu teir gleðast um, tí tað var um reppið, at teir í Blackburn skuldu út í ein umdyst í aðru viku. Ímóti dystarenda sendi Blyth Spartans spælarin, Simon Todd eina frálíka sending inn í brotsteigin hjá Blackburn. Andrew Wright var púra leysur bara 6 metrar frá Blackburn-málinum, og ein minutt seinni stútaði liðfelagin, Alex Gildea bóltin beint upp um málið hjá Blackburn.

Tað einasta sum skilti liðið úr Premier League og liðið úr 6. deild var ein frísparksperla hjá Carlos Villanueva. Fram til málið hevði Blackburn stýrt tí mesta, men seinastu løtuna vóru teir veruliga undir trýsti, men við hepni riðu teir stormin av á hesum sinni.

Blackburn spælir úti ímóti Sunderland í 4. umfari.

**-heris**